# 2,8%

Nakað síðani setti Klaksvíkar býráð ein vakstrarbólk at greina støðuna í Klaksvík og at útgreina, hvussu negativa gongdin í Klaksvík kann vendast, so at tað aftur verður menning og framburður í býnum.

Í bólkinum sótu býráðslimirnir Jógvan Skorheim, formaður, Eyðgunn Samuelsen og Óli Matras Lassen.

Vakstrarbólkurin hevur so leitað sær serkøna hjálp hjá Suna Poulsen, sálarfrøðingi hjá Marketminds í Danmark, tað er eitt virki, sum vanliga fæst við at gera marknaðarkanningar fyri privatvirki.

Orsøkin til, at hetta varð sett í verk, er, at seinastu nógvu árini er Klaksvíkin dragnað, tí fólkatalið er minkað, samstundis sum tað er vaksið í Føroyum sum heild.

Hetta er hent hóast stórar íløgur eru lagdar í samferðsluna, enntá í undirsjóvartunnil og aðrar hentleikar fyri at gera tað lættari hjá fólki.

Samstundis eru umstøðurnar í Klaksvík eisini rættiliga góðar á øðrum økjum, tí tørvurin á barnaansing er nøktaður og kommunan hevur nógv grundstykki til taks, umframt at havnaviðurskiftini eru framúr góð.

Men alt hetta hevur ikki ført nakran vøkstur við sær, tí tey turru tølini vísa, at síðani 1985 er fólkatalið í Føroyum vaksið 6,9%, men samstundis er tað minkað 2,8% í Klaksvík.

Hetta er ein støða, sum Klaksvíkar Býráð tekur í størsta álvara, tí heldur hendan gongdin fram, verður Klaksvíkin ikki næststørsti býur í Føroyum leingi afturat, tí menningin rundan um Skálafjørðin er risastór, staðfestir vakstrarbólkurin.

# Klaksvík manglar fólk í slipsi og klædningi




Mynd: Dávur Winther

**VØKSTUR Í KLAKSVÍK** Skal gongdin í Klaksvík venda, er tað neyðugt fáa fleiri størv í fiskivinnuni til fólk í slipsi og klædningi, sigur Suni Poulsen, sálarfrøðingur

Áki Bertholdsen

- Skal tað eydnast at menna Klaksvíkina, er fyrsta fortreytin at fáa eitt fjølbroyttari vinnulív í býnum.

Tað staðfestir Suni Poulsen, sálarfrøðingur, sum hevur kannað eftir, hvussu støðan er í Klaksvík.

Hann sigur, at skalt tú skapa vøkstur í einum staði, er tað neyðugt at hava eitt fjølbroytt vinnulív, men tað hevur Klaksvík ikki, tí har er fiskivinnan høvuðsvinnan burturav.

- Klaksvík er sum ein handil við einari vøru á hyllini, men skal tað eydnast at lokka fólk til, er neyðugt at fáa fleiri vørur á hyllarnar, sigur hann so rámandi á myndamáli.

- Í hesum sambandi er eisini neyðugt at skapa fleiri størv til fólk við hægri útbúgving.

## Byggja oman á

Hann sigur, at klaksvíkingar eru rættiliga frammaliga í fiskivinnuni og besta útgangsstøðið í royndunum at fjøltátta vinnulívið, er at byggja oman á eitt virkisøki, har tú frammanundan ert dugnaligur.

- Klaksvíkingar hava eina langa og stórfingna fiskivinnusøgu og mítt besta boð er, at skal Klaksvíkin mennast, er besta leiðin fyrst og fremst leggja dent á skapa menning á økjum, har tey frammanundan eru dugnaligir.

Suni Poulsen sigur, at hetta merkir, at Klaksvíkingar skulu fáa meiri burtur úr fiskivinnuni, men teir skulu eisini brúka fiskivinnuna til at skapa nýggjar og avleiddar vinnur, kanska matvøruvinnu ella annað.

Í hesum sambandi heldur hann eisini, at tað er neyðugt at økja um útbúgvingartilboð og gransking, eitt nú í fiskivinnuni.

- Við øðrum orðum eiga klaksvíkingar at leggja seg eftir at skapa fleiri størv í fiskivinnuni til fólk í slipsi og klædningi, leggur hann afturat.

Men tað er eisini neyðugt at royna at fáa heilt nýggjar vinnur til Klaksvíkar, men tað er ein drúgv tilgongd.

## » Fólk, sum hoyra til ávísar trúarsamfeløg, fáa ikki longur sersømdir í Klaksvík

# 200 fólk

Kanningin, sum vakstrarbólkurin hevur gjørt fyri at lýsa og greina støðuna og menningarmøguleikar í Klaksvík, er býtt sundur í tríggjar partar.

Kanningin er fyri ein part bygd á samrøður við fólk og tilsamans hava tey tosað við 200 fólk.

Talan er um klaksvíkingar og fremmandafólk í Klaksvík, umframt klaksvíkingar í Havn og klaksvíkingar í Danmark.

Í fyrstu atløgu tosaðu tey við fólk í Klaksvík, sum umboðaðu ymsar bólkar í samfelagnum, bæði til vinnulív, mentan og sosiala støðu.

Í aðru atløgu tosaðu tey við klaksvíkingar, sum hava búsett seg í Havn og í Danmark og tey hava eisini tosað við fremmandafólk, sum eru flutt til Klaksvíkar

Hesi fólkin hava so greitt frá, hvat tey halda er gott í Klaksvík og hvat eigur at broytast fyri at tey hava hug at búsetast í Klaksvík ella fyri at eggja teimum at flyta aftur til Klaksvíkina.

Í triðju atløgu hava tey roynt at fáa hesa ætlaðu menniningina kjølfesta í fólkinum, so at øll føla eina ábyrgd fyri at menna Klaksvík, men hetta er ein tilgongd, sum gongur yvir fleiri ár.

Vakstrarbólkurin heldur, at hendan vitanin er ein fortreyt fyri at kunna seg tiltk í verk, tí skal nakað gerast, mugu tey fyrst vita, hvar tey flóta og hvat tey skulu leggja dent á í royndunum at menna býin.

# Typiskir klaksvíkingar

Í sínum kanningum hevur sálarfrøðingurin eisini gjørt ein tvørskurð av nøkrum typiskum klaksvíkingum.

Ein typiskur klaksvíkingur, sum búsetist í Klaksvík, er ein 32 ára gamal giftur maður við tveimum ella trimum børnum. Hann hevur kanska prógv frá miðnámsskúla ella hevur hann eina sjóvinnuútbúgving og hann er sjómaður.

Hann hámetir eitt familjulív, eisini systkin og foreldur, og at børnini hava trygg kor og at umhvørvið er trygt og kent. Hann virðismetir góðar vinir, støðufesti og hann vil hava hús, bil og bát.

Men ein typiskur klaksvíkingur, ið búsetist í Havn, er ein 27 ára gamal maður ella 27 ára gomul kvinna, sum er sambúgvandi og hevur eitt ella tvey børn. Tey hava eina miðal langa ella eina langa útbúgving og sita í almennum starvi.

Tey virðismeta eitt gott starv og møguleikarnar fyri starvsmenning og harafturat eisini frítíðar- og mentanartilboð og eitt náttarlív. Familjan er høgt í metum, men tey vilja eisini hava umstøður at uppliva ymiskt annað.

Ein typiskur klaksvíkingur, sum búsetir seg í Danmark, er ein 24 ára gomul, støk kvinna. Hon eigur kanska eitt barn. Hon er strembari. Antin er hon undir útbúgving, ella hevur hon eina høga útbúgving, kanska stjóri, ráðgevari ella granskari.

Niðurstøðan hjá sálarfrøðinginum er, at Klaksvíkin er ov einstáttað og hevur ov fá tilboð til tey, sum vilja hava ein annan lívsstíl enn tann typiski klaksvíkingurin hevur.

## » Klaksvíkingar eru bygdasligir og eitt sindur heimføðisligir – og eitt sindur stoltir av tí